

# RSIGRAR

# Bárður roy ndist væl



**BROTSSPARK**

*Fyrrverandi HB málverjin, Bárður Johannesen, bjargar brotssparkinum frá Jákupi á Borg*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**VODAFONEDEILDIN** Bæði við- og mótspælarar rósa gamla HB-málverjanum, sum í gjár gjørdi »come-back« í B71-málinum, millum annað við at bjarga brotssparki

Uni Holm Johannesen

– Eg var kanska ov spentur í støðuni. Tað var ferð á skotinum, men Bárður Johannesen bjargaði meistarliga væl.

Tað er niðurstøðan hjá Jákupi á Borg um brotssparkið, sum hann misnýtti í fyrra hálvleiki í gjár.

Bárður Johannesen royndi seg aftur sum málverji í bestu føroysku deildini í gjár. 37 ára gamli havnarmaðurin vardi málið hjá B71, og hóast hann noyddist tríggjar ferðir í málið eftir bóltinum, fær hann góð skoðsmál frá við- og mótstøðuspælarum.

– Bárður royndist sera væl. Tað merktist ikki, at hann ikki hevur spælt leingi, sigur Høgni Midjord, sum var framherji hjá B71.

Predrag Markovic, sum vanliga verjir málið hjá B71, er skaddur og væntast ikki tøkur komandi seks vikurnar. B71 hevur 18 ára gamla Gustav Hentze í leikarahópinum, men leiðslan valdi at spyrja um leikaraloyvið hjá Bárði Johannesen, sum seinastu tvey árini hevur verið í AB.

Bárður Johannesen gavst upprunaliga í 2006, og síðani hevur hann spælt hondbólt við Kyndli.

uni@sosialurin.fo